Góðu foreldur!

Nú skúlaárið byrjar fara vit við hesum at greiða tykkum frá, hvussu vit skipa dagin.

Dagarnir fyrstu vikurnar hava verið skipaðir soleiðis:

Kl. 08:00 – 09:10 samling, rokning og okkurt kreativt

Kl. 09:10 – 09:30 Lítil matpakki

Kl. 09:30 – 10:00 Fríkorter

Kl. 10:00 – 11:20 Spæl o.a.

Kl. 11:20 – 11:30 Rudda, taka saman um, syngja og farvæl

Tað eru eisini nøkur praktisk viðurskifti, ið vit skulu fáa uppá pláss.

Samling: Vit byrja enn hvønn morgun við, at samlast inni í forskúlanum og ikki inni í "Miðrók", har hinir næmingarnir hava morgunsang.

Sitipláss: Næmingarnir hava fingið fast sitipláss inni í flokkinum. Vit fara framyvir at skifta pláss av og á.

Matpakkar og drekkidunkar: Av tí, at vit eta lítlan matpakka fyrrapart og stóran matpakka á døgurða, fara vit at minna tykkum á, at geva barni tykkara tveir matpakkar við. Tann lítli matpakkin skal verða í taskuni, meðan tann stóri matpakkin skal í køliskápið á ganginum. Gott í tykkum um tit seta navn á matpakkarnar. Eisini er týdningarmikið, at børnini hava drekkidunkar við.

Fríkorter: Vit fara út at spæla í fríkorterinum, so hóskandi klæðir, til okkara deiliga føroyska veðurlag, eru kærkomin: ☺ Fríkorterið hjá okkum liggur nú saman við hinum næmingunum og tað riggar væl ☺

Boð: Um tit hava boð til forskúlan, skulu hesi boð gevast forskúlanum, og um tit hava boð til frítíðarskúlan, skulu hesi boð gevast frítíðarskúlanum. Hetta so, at eingi boð "detta burturímillum".

Postkassin: Ein postkassi er í taskuni hjá barni tykkara, so minnist til at hyggja í hann, tí at postkassan brúka vit til, at geva tykkum ymisk boð.

Leikur: Leikur, sum børnini hava við í skúla, skulu verða í taskuni, til fríkorter ella spæliløta er, tó skulu súkklur ella rulluskoytir ikki við í forskúlan.

Um tit hava spurningar ella okkurt uppá hjartað, eru tit vælkomin at ringja, senda okkum sms boð ella ein teldupost til toymisleiðaran.